**Rokntskaparfelagið**
*Skrásettir grannskoðarar*
J.C. Svabosgøta 48 · P.O. Box 2210 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf. +298 309400 · Fax +298 309409 · www.roknskap.fo · roknskap@roknskap.fo
Sp/f skrá. nr. 2212 · V-tal: 413.887

Fountain Húsið
Tinghúsvegur 12
FO-100 Tórshavn

# ÁRSFRÁSØGN

## 1. jan. - 31. des. 2015

Henda ársfrásøgn er framløgd og góðkend á stýrisfundi felagsins

hin 31. mars 2016

Fundarstjóri: Birta Biskopstø

**Til Roknskaparfelagið skrásettir grannskoðarar Sp/f**

Ársfrásøgnin hevur 14 síður

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Leiðslufrágreiðing** | **3 - 4** |
| Upplýsingar um felagið | 3 |
| Frágreiðing | 4 |
| **Átekningar** | **5 - 7** |
| Leiðsluátekning | 5 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 6 - 7 |
| **Ársroknskap 1. januar - 31. desember** | **8 - 14** |
| Nýttar roknskaparreglur | 8 - 9 |
| Rakstrarroknskapur | 10 |
| Fíggjarstøða, ogn | 11 |
| Fíggjarstøða, eginpeningur og skyldur | 12 |
| Notur | 13 - 14 |

# Leiðslufrágreiðing

**Upplýsingar um felagið**

Fountain Húsið
Tinghúsvegur 12
FO-100 Tórshavn

Telefon: 32 00 12

V-tal: 607.258
Kommuna: Tórshavn
Roknskaparár: 1. januar til 31. desember (roknskaparár nr. 2)

**Dagligur leiðari:**
Súna Mørk

**Stýrið:**
Birta Biskopstø, forkvinna
Súsanna Winther Poulsen, næstforkvinna
Mortan Rasmussen, stýrislimur
Ann Zachariassen, stýrislimur
Ása Olsen, stýrislimur

**Grannskoðari:**
Roknskaparfelagið, skrásettir grannskoðarar Sp/f
J. C. Svabosgøta 48
Postrúm 2210
FO-110 Tórshavn

**Stýrisfundur**
Stýrisfundur verður hildin eftir nærri áseting.

**Peningastovnur**
Eik Banki P/F

## Leiðslufrágreiðing

### Frágreiðing

**Endamál**
Endamáli við Fountain Húsinum er at skapa møguleikar hjá fólki við sálartrupulleikum/sjúkum at virka á jøvnum føti við aðrar borgarar í samfelagnum. Hettar verður gjørt m.a. við at styrkja sjálvsvirði, ábyrgdarkenslu og sosialar førleikar við tilknýtið til arbeiðsmarknaðin og at stuðla limum í húsinum at fáa sær egnan bústað.

**Fíggjarliga gongdin**
Gongdin í 2015 hevur verið nøktandi.

### Hendingar eftir roknskaparárslok
Eftir statusdagin er einki hent, sum hevur avgerandi ávirkan á ársfrásøgnina.

**Framtíðarútlit**
Stýrið væntar at 2016 verður á sama støði sum 2015.

# Átekningar

**Leiðsluátekning**

Stýrið hevur í dag viðgjørt og viðtikið ársfrásøgnina við leiðslufrágreiðingini fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2015, hjá Fountain Húsið.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við galdandi føroyskar roknskaparreglur.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. des. 2015, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. jan. til 31. des. 2015.

Harumframt meta vit, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenningar á fundi í stýrinum.

Tórshavn, 31. mars 2016

**Dagligur leiðari:**

Súna Mørk

**Stýrið:**

Birta Biskopstø
Forkvinna

Súsanna Winther Poulsen
Næstforkvinna

Ása Olsen
Stýrislimur

Mortan Rasmussen
Stýrislimur

Ann Zachariassen
Stýrislimur

## Átekningar

**Váttan frá óheftum grannskoðara**

***Til stýrið í Fountain Húsið***

**Átekning á ársfrásøgnina**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Fountain Húsið fyri roknskaparárið 1. jan. - 31. des. 2015 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur. skapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðaraprógv, ið kann verða grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Átekningar

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. des. 2015 og av úrslitinum av virksemi felagsins í tíðarskeiðnum 1. jan. - 31. des. 2015 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Vit hava, sum ásett í ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, 31. mars 2016

**Roknskaparfelagið, skrásettir grannskoðara Sp/f**

Olaf Frits Joensen
skrásettur grannskoðari
*limur í FSR - danske revisorer*

## Nýttar roknskaparreglur

Ársfrásøgnin hjá Fountain Húsið er gjørd eftir ásetingum fyri fyritøkur í flokki B í ársroknskaparlógini.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl (uttan desimalir). Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Gjaldoyra**
Ársfrásøgnin er gjørd í donskum krónum.

**Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini**
Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Útreiðslur, nýttar til at røkka ársins inntøku, verða tiknar við í rakstrarroknskapinum.

**Nettosøla**
Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin, so hvørt sum fakturerað verður.

**Skiftandi kostnaður**
Skiftandi kostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvðusraksturin hjá felagnum.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður fevnir um a-lønir og tilknýtt arbeiðsmarknaðargjøld.

## Nýttar roknskaparreglur

### Avskrivingar

Avskrivingar av materiellari støðisogn verður løgd soleiðis til rættis, at tað fer fram ein skipað avskriving av støðisognini grundað á eina meting av brúkstíðini. Felagið hevur brúkt niðanfyri standandi brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirðið |
|---|---|---|
| - Bilur | 3 ár | 0 kr. |

Tá materiell støðisogn verður seld, verða vinningur ella hall gjørt upp sum munurin millum søluprís og niðurskrivaða virði á støðisognini, sum verða tikin við í rakstrarroknskapin.

### Annar rakstarkostnaður

Annar rakstarkostnaður fevna um inntøkur og kostnað, sum ikki hoyra til høvuðs-raksturin hjá felagnum.

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður upptikin til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum. Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði.

Kostprísur er útveganarprísur, umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Tól, ið kosta minni enn kr. 20.000, eru kostnaðarførd.

Tá materiell støðisogn verður seld, verða vinningur ella hall gjørt upp sum munurin millum søluprís og niðurskrivaða virði á støðisognini, sum verða tikin við í rakstrarroknskapin.

### Áogn

Áognin er tikin við til áljóðandi virði, tapsvandi verður gjørdur upp eftir einstaklingameting og frádrigin í rakstrinum.

### Tøkur peningur

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv við eini lánitíð upp á undir 3 mánaðar, og sum uttan forðing kunnu umsetast til tøkan pening, og har vandin fyri virðisbroytingum er uttan týdning.

### Skuld

Við stovnan verða lán innroknað í fíggjarstøðuna við móttiknari upphædd, eftir frádrátt av stovningarútreiðslum. Síðani verða lán virðissett til amortiseraðan útveganarvirði, sum til kontantlán svarar til restvirðið av láninum.

Onnur skuld verður virðissett til nettorealisatiónsvirði.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 2.302.495 | 2.230.192 |
| 2 | Skiftandi kostnaður | -313.018 | -118.958 |
| 3 | Annar rakstrarkostnaður | -278.195 | -575.349 |
| | **Bruttovinningur** | **1.711.282** | **1.535.884** |
| 4 | Starvsfólkakostnaður | -1.330.716 | -981.867 |
| | Roknskaparligar avskrivingar | -94.646 | -7.887 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarligar inntøkur og kostnað** | **285.920** | **546.130** |
| 5 | Fíggjarligur kostnaður og tílíkur kostnaður | -832 | -927 |
| | **Ársúrslit** | **285.088** | **545.203** |

| | | |
|---|---|---|
| **Uppskot til yvirskotsbýti** | | |
| Ársúrslit | 285.088 | 545.203 |
| Fluttur vinningur 1. jan. | 545.203 | 0 |
| **Flytast til komandi ár** | **830.292** | **545.203** |

## Fíggjarstøða 31. desember

| Nota | | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | **Støðisogn** | | |
| 6 | **Materiell støðisogn** | | |
| | Rakstrargøgn | 181.405 | 276.051 |
| | | **181.405** | **276.051** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | **Áogn** | | |
| | Debitorar | 5.461 | 0 |
| | Tíðaravmarkingar | 15.939 | 10.882 |
| | | **21.400** | **10.882** |
| 7 | **Tøkur peningur** | **811.187** | **412.284** |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **832.588** | **423.165** |
| | **Ogn tilsamans** | **1.013.993** | **699.216** |

## Fíggjarstøða 31. desember

| Nota | | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| | **Skyldur** | | |
| 8 | **Eginpeningur** | | |
| | Stovnsfæ | 100.000 | 100.000 |
| | Flutt úrslit | 830.292 | 545.203 |
| | | **930.292** | **645.203** |
| | **Skuld** | | |
| | **Stuttfreistað skuld** | | |
| | Kreditorar | 68.076 | 38.388 |
| | Tíðaravmarkingar | 15.625 | 15.625 |
| | | **83.701** | **54.013** |
| | **Skuld tilsamans** | **83.701** | **54.013** |
| | **Skyldur tilsamans** | **1.013.993** | **699.216** |

9 **Veðsetingar og trygdarveitingar**

# Notur

| | | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| 1 | **Inntøkur** | | |
| | Veittur stuðul | 2.000.000 | 2.200.000 |
| | Gávur | 71.670 | 16.700 |
| | Arbeiðsinntøka | 207.500 | 0 |
| | Inntøka køkseind | 23.325 | 13.492 |
| | | 2.302.495 | 2.230.192 |
| 2 | **Skiftandi kostnaður** | | |
| | Keyp av tilfari | 123.240 | 33.148 |
| | Arbeiðseind køkur | 72.363 | 43.207 |
| | Arbeiðseind Hús og urtagarð | 54.772 | 0 |
| | Arbeiðseind kreativ | 764 | 0 |
| | Tiltøk | 4.033 | 0 |
| | Amboð | 0 | 31.380 |
| | Keyp av arbeiðsmegi | 57.846 | 11.224 |
| | | 313.018 | 118.958 |
| 3 | **Annar rakstrarkostnaður** | | |
| | Bilrakstur | 16.248 | 7.117 |
| | Aðrar tryggingar | 4.872 | 0 |
| | Smáamboð | 6.316 | 0 |
| | Húsaleiga | 89.958 | 62.156 |
| | Streymnýtsla | 6.472 | 5.974 |
| | Oljunýtsla | 21.476 | 13.761 |
| | Skeið | 0 | 28.702 |
| | Heimasíða | 6.821 | 882 |
| | Lýsingar | 3.750 | 15.502 |
| | Samskiftiskostnaður | 14.703 | 11.613 |
| | Skrivstovuhald | 25.575 | 185.438 |
| | Keyp av innbúgv | 63.159 | 188.588 |
| | Bókhald | 0 | 5.391 |
| | Grannskoðan | 15.625 | 15.625 |
| | Ferðakostnaður | 100 | 34.700 |
| | Kassamunur | 41 | -274 |
| | Annar kostnaður | 3.078 | 175 |
| | | 278.195 | 575.349 |

# Notur

| | | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|
| 4 | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | A-løn | 1.123.089 | 848.654 |
| | Eftirløn | 147.538 | 105.872 |
| | Als-gjald | 13.007 | 8.837 |
| | Barsilsgjald | 6.527 | 6.125 |
| | AMG-gjald | 18.225 | 12.378 |
| | Annar starvsfólkakostnaður | 22.330 | 0 |
| | | 1.330.716 | 981.867 |
| 5 | **Fíggjarligur kostnaður og tílíkur kostnaður** | | |
| | Annar bankakostnaður | 832 | 927 |
| | | 832 | 927 |
| 6 | **Materiell støðisogn** | | |
| | **Rakstrargøgn** | | |
| | Útvegnaðarvirði primo | 283.938 | 0 |
| | Tilgongd í árinum | 0 | 283.938 |
| | Avskrivingar í árinum | -94.646 | -7.887 |
| | Avskrivingar higartil | -7.887 | 0 |
| | | 181.405 | 276.051 |
| 7 | **Tøkur peningur** | | |
| | Eik Banki - 417.217.7 | 263.885 | 311.838 |
| | Eik Banki - 417.166.9 | 2.612 | 2.389 |
| | Eik Banki - 428.910.4 | 95.953 | 93.632 |
| | Eik Banki - 488.521.1 | 442.745 | 0 |
| | Kassi | 5.993 | 4.425 |
| | | 811.187 | 412.284 |
| 8 | **Eginpeningur** | | |
| | Stovnsfæ | 100.000 | 100.000 |
| | | 100.000 | 100.000 |
| | **Fluttur vinningur** | | |
| | Fluttur vinningur 1. jan. | 545.203 | 0 |
| | Ársins úrslit | 285.088 | 545.203 |
| | Fluttur vinningur 31. des. | 830.292 | 545.203 |
| | **Eginpeningur 31. desember** | 930.292 | 645.203 |

9 **Veðsetingar og trygdarveitingar**

Ongar veðsetingar hvíla á felagnum.